MENTAMÁLARÁÐIÐ

# STARV SUM FYRSTILÆRARI Í SANDS SKÚLA

Hevur tú áhuga og hegni at átaka tær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum og virka fyri alsamt at menna skúlans arbeiði, so hevur tú møguleika at søkja starvið sum fyrstilærari í Sands Skúla. Í Sands skúla eru 58 næmingar í 5 árgangum, og 5 lærarar eru í føstum starvi í skúlanum. Starvið verður sett frá 1. oktober 2014.

**Um starvið**
Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Hann skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim og í samstarvi við foreldrini virka fyri, at næmingarnir fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

Harumframt skal fyrstilærarin vera førur fyri at skipa eina mennandi starvsfólkaleiðslu, skapa umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning. Eisini skal fyrstilærarin skapa virðing fyri skúlanum og leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Sands Skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 32.2 og 33.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 11. september 2014.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

**MENTAMÁLARÁÐIÐ**

---

*Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*